## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av eystri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av landsynningi, seinnapartin veksur hann vindin upp í strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 6 og 9 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og regn. Seinnapartin strúkur í vindi av útsynningi og ælingur. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 9 stig.

# Klaksvíksbørn nýggjan garðvakt

**Mánadagin fingu børnini í Skúlanum á Ziskatrøð ein spildur nýggjan garðvakt.**

**Men talan er ikki um ein vanligan garðvakt, hesin er nakað heilt fyri seg.**

KAVI
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík, Sosialurin:** Børnini í Skúlanum á Ziskatrøð kunnu ikki kenna seg heilt trygg longur. Skúlagarðurin fekk týsdagin ein nýggjan garðvakt, og hesin er ikki hvør sum helst. Óivað er hesin tann størsti garðvakturin, sum nakrantíð hevur verið at sæð í Klaksvík, allarhelst eisini í Føroyum yvirhøvur.

Hesin er so stórur, at hann sær alt, sum gongur fyri seg í garðinum. Og líkamikið, hvar tú stendur, so sært tú eisini hann. So illa ber til at gera fortreð longur.

Men hóast hann møguliga sær eitt sindur ræðandi út, so frætta vit frá børnunum, at hann er so sera fittur og fryntligur. Hann er góður við øll børn, og hann hugnar sær, har hann stendur og hyggur út yvur børnini, meðan tey spæla í fríkorterunum.



*Børnini máttu nýta ein stiga fyri at sleppa heilt upp á kavamannin*



*Kavamaðurin gjørdist ikki minni enn heilar 4,10 metrar høgur*

### Størsti nakrantíð

Børnini í Skúlanum á Ziskatrøð hava sjálvi bygt hendan stóra og vakra kavamann, sum stendur inni í skúlagarðinum.

Kavin hevur ligið tjúkkur yvir allar Norðoyggjar í fleiri vikur nú, og fyri summi er hetta als einki stuttligt.

Men sum so oftast, duga børn at síggja okkurt positivt við øllum, og soleiðis var eisini seinasta týsdag. Meðan fólk í býnum østu seg inn á kavan, sum tarnaði flest allari ferðslu, fóru børnini í holt við at byggja ein kavamann, sum óivað er ein tann størsti nakrantíð í býnum.

Áðrenn børnini fóru til hús seinnapartin, var kavamaðurin vorðin heilar 4.10 metrar høgur.

Vit hava frætt, at hetta ikki er fyrstu ferð, at børnini á Ziskatrøð byggja stórar kavamenn. Men hesin í ár er so tann størsti, tey nakrantíð hava bygt.

Eftir er so bert at vóna, at børnini fáa gleði av nýggja garðvaktinum í nakrar dagar afturat.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷11 |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷12 |
| Saint John's | ÷4 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | ÷1 |
| Seyðisfjørður | ÷4 |
| Tórshavn | 1 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 4 |
| London | 11 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 8 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 3 |
| Moskva | 2 |
| Berlin | 9 |
| Warzawa | 14 |
| Kiev | 4 |
| Bukarest | 8 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 16 |
| Malorca | 22 |
| Athen | 18 |
| Malta | 17 |
| Tunis | 20 |
| Beijing | 11 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 7 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 17 |
| Meksikobýur | 24 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 20 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst 1016 hPa. eystan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og mennist.




Hátrýstið í landnyrðing úr Íslandi stendur mestsum í stað, men lágtrýstið í útsynning úr Íslandi fer spakuliga norðureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygardagin.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 19/03 kl. 06[00]– 20/03 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 0,2°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 19/03 kl. 06[00]– 20/03 kl. 06[00]
Avfallið higartil í mars: 29,0 mm

Flogferðir
ring 345900

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

## VESTFALLSKYRRINDI

14. mars: Tendring/Mánin longst frá jørðini
22. mars: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| | Suðuroyar—/ Vágafirði | | Skúvoyar—/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna—sundi | | Mykines—firði | | Nólsoyar—firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar—/ Svínoyarfirði | | Hvanna—sundi | | Fugloyar—firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 21. mar | 11.38 | — | 10.38 | 23.05 | 10.53 | 23.20 | 01.12 | 13.38 | 02.12 | 14.38 | 09.53 | 22.20 | 08.53 | 21.20 | 11.53 | — | 00.27 | 12.53 | 11.23 | 23.50 | 00.12 | 12.38 |
| 22. mar | 00.05 | 12.44 | 11.44 | — | 11.59 | — | 02.05 | 14.44 | 03.05 | 15.44 | 10.59 | 23.38 | 09.59 | 22.38 | 00.20 | 12.59 | 01.20 | 13.59 | — | 12.29 | 01.05 | 13.44 |
| 23. mar | 01.23 | 14.03 | 00.23 | 13.03 | 00.38 | 13.18 | 03.23 | 16.03 | 04.23 | 17.03 | — | 12.18 | 11.18 | 23.58 | 01.38 | 14.18 | 02.38 | 15.18 | 01.08 | 13.48 | 02.23 | 15.03 |
| 24. mar | 02.43 | 15.09 | 01.43 | 14.09 | 01.58 | 14.24 | 04.43 | 17.09 | 05.43 | 18.09 | 00.58 | 13.24 | — | 12.24 | 02.58 | 15.24 | 03.58 | 16.24 | 02.28 | 14.54 | 03.43 | 16.09 |